# Føroyavinurin

**Stórmeistarin Ivan Sokolov sum í 1992, 93, 95 og í 1997 var á talvvitjan í Føroyum, er á odda í sterkari stórmeistarakapping í Bosnia-Herzogovina.**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Fimm av níggju umførum eru eru telvd, og saman við Movsesian úr Kekkia, er Sokolov fremstur við 3,5 stigum. Tann kanska enn meira kendi, Alexei Shirov, hevur trý stig.

Ivan Sokolov úr Bosnia-Herzogovina, nú búsitandi í Hollandi, hevur verið sera kærkomin fyri føroyska telving. Saman við landsmanninum, Predrag Nikolic, kollvelti hann føroyska telving fyrst- og miðskeiðis í nítiárunum. Heilt nógvir ungdómar fingu frálæru frá teimum báðum fryntligu stórmeistarunum, og teir sum serliga eru sprotnir burturúr góðu frálæruni eru Ólavur Simonsen og Flóvin Tór Næs. Eisini Rógvi W. Rasmussen, undirritaði og aðrir fingu góðan íblástur sum hevur hjálpt okkum á veg.

Tíverri hava hvørki Sokolov ella Nicolic verið á klettunum síðani 1997.

### Er stórmeistari

33 ára gamli Ivan Sokolov livur av at telva, og tað hevur gjørt síðani seinast í 80´unum. Hann hevur ferðast kring heimin, serliga Evropa, í talvkappingum, og hevur hann verið sera støðugur. T.d hevur hann nøkunlunda sama ratingatal nú sum í 1992, tá hann vitjaði Føroyar á fyrsta sinni.

Eftir nógvar miðalavrikskappingar, vísti Sokolov í stórligu Eurotel-kvikkappingini herfyri, har øll heimselitan varð savnað, at hann sanniliga eigur at metast sum ein sera sterkur stórmeistari. Hann leikti seg fram til hálvfinaluna, har indarin Anand bleiv banamaður hansara. Framanundan hevði Sokolov eitt nú bast Leko og Adams. Og í hesum døgum í Bosnia, telvar hann eisini sera væl.

### Vann á Radjabov

Talvið hesa vikuna er frá kappingini í Bosnia. Sokolov vann á stjørnuskotinum Teimour Radjabov, 15 ár, (sum luttók í 3rd Tórshavn International í 2000), sum nú hevur 2610 í rating.

Sjálvt um Sokolov tapti í fimta umfari móti Dreev, so er fyrsta pláss enn hansara. Enn væntar honum Shirov, og við hvíta fólkinum hevur Sokolov góðar kjansir at gera ein vørr.

Gott hevði verið fyri føroyska framtíðartelving, at fingið Sokolov ella Nicolic til Føroyar aftur. Serliga nú tá øgiligt boom er í barnatelvingini kring landið.

## Talvið hesa vikuna

**Sokolov,I (2647) - Radjabov,T (2610)**
**Bosnia GM Sarajevo BIH (4), 25.05.2002**

1.d4 Rif6 2.c4 g6 3.Ric3 Bg7 4.Rif3 0-0 5.Bg5 h6 6.Bh4 d6 7.e3 c5 8.d5 g5 9.Bg3 Rih5 10.Bd3 f5 11.Rid2 Rixg3 12.hxg3 e5 13.g4 e4 14.Bc2 fxg4 15.Ridxe4 Bf5 16.Rig3 Bxc2 17.Fxc2 Rid7 18.Rif5 Ff6 19.e4 Fe5 20.Rixh6+ Bxh6 21.Rxh6 Rif6 22.0-0-0 Kg7 23.Rdh1 Rh8 24.Rxh8 Rxh8 25.Rxh8 Kxh8 26.g3 a6 27.a4 Fd4 28.Fe2 Kg7 29.a5 Fe5 30.Kc2 Kg6 31.Kb3 Kg7 32.Kc2 Kg6 33.Kd1 Kg7 34.Ke1 Kg6 35.Fd1 Kg7 36.Kf1 Kh6 37.Kg2 Kg6 38.Fb3 Fd4 39.e5 Fxe5 40.Fxb7 Rie4 41.Fxa6 Rixc3 42.bxc3 Fe4+ 43.Kh2 Kh5



44.Fc8 [44.Fxd6?? Fg2+! 45.Kxg2 patt!] 44...Fxc4 45.a6 Fa2 46.Ff5 Kh6 47.Ff6+ Kh5 48.Ff7+ Kh6 49.a7 1-0

# Taptu tepurt fyri Cypern



*U-20 landsliðið, sum her er avmyndað undir venjing, megnaði akkurát ikki at fáa stig, tá teir dystaðust móti vertunum av Cypern*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**U-20 landsliðið í manshondbólti tapti sum væntað greitt fyri Russlandi og Jugoslavia, men móti Cypern var bert eittans mál á muni**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Føroya U-20 landsliðið í manshondbólti hevur hesar seinastu dagarnar verið á Cypern, har teir hava tikið lut í EM-undankappingini. Umframt Føroyar vóru Cypern, Jugoslavia og heimsmeistararnir úr Russlandi í okkara bólki.

Fyrstur av teimum trimum var dysturin móti Russlandi, og sum vera man, so kundi roknast við, at okkara menn vóru við undirlutan í hesum. 40-18 varð úrslitið móti heimsmeistarunum.

Síðani var dysturin móti Cypern á skránni. Kanska við eitt sindur blandaðum kenslum, tí hóast Cypern á pappírinum átti veikasta av teimum trimum mótstøðulondunum, so høvdu Cypriotarnir vunnið greitt á Føroyum, tá somu árgangir hittust fyri nøkrum árum síðani.

Hesaferð gekst tó væl hjá okkara dreingjum. Somikið væl, at tað bert restaði eitt mál í at fáa stig burturúr dystinum, sum Cypern vann 21-20.

Seinasti dysturin varð leiktur móti Jugoslavia. Okkara menn vóru nú heldur troyttir, og í einum sera hart spældum dysti vunnu jugoslavarnir heili 48-20 á okkara monnum.

Føroyska ferðalagið verður aftur í Føroyum mánakvøldið, og væntandi frætta vit meira frá ferðini í mikudagsblaðnum.



# Føroysk list í Berlin

**Føroysk samtíðarlist sýnd fram í felagshúsinum hjá norðurlendskum sendistovunum í Berlin í juni**

LISTAFRAMSÝNING
*Listafelag Føroya*

Listafelagið vil gera føroyska list kenda uttan fyri norðurlond, og tí verður skipað fyri framsýning við samtíðarlist í Berlin. Við á framsýningini eru 24 listaverk, sum norðurlendsk úrtøkunevnd hevur sett saman. Tey eru Hanni Bjartalíð, Zacharias Heinesen, Hansina Iversen, Bárður Jákupsson, Rannvá Kunoy, Anker Mortensen, Amariel Norðoy, Hans Pauli Olsen, Torbjørn Olsen, Tróndur Patursson, Eyðun av Reyni og Ingálvur av Reyni.

Tá ið framsýningin letur upp, hevur Malan Marnersdóttir stutta framløgu, og Ernst Sondum Dalsgarð, tenorur og operesangari, framførir saman við klaverleikaranum, Kristin Stubbe Teglbjerg, brot úr nýggjum tónaverki hjá Tróndi Bogasyni

Í sambandi við listaframsýningina verður mentanarkvøld tann 3. juni kl. 19. Á skránni verður m. a. ljósmyndarøð við náttúrulýsingum eftir Inga Joensen og filmurin "Svartur sannleiki", ið Dánjal Højgaard og Hans Petur Hansen gjørdu um listamannin Ingálv av Reyni. Harumframt heldur Bárður Jákupsson fyrilestur um listamannin S. J. Mikines.

Framsýningin er opin frá 2. - 29. juni 2002 í Fellshus der Nordischen Botschaften, Rauchstrasse 1, Berlin - Tiergarten.

# Norðoyastevnuframsýning

LISTAFRAMSÝNING
*Tíðindaskriv*

Listaframsýningin á Norðoyastevnu verður í Skúlanum við Ósánna leygardagin tann 1. juni og sunnudagin tann 2. juni.

Tað er Norðoya Listafelag, sum skipar fyri framsýningini, og tekur sær av øllum tí praktiska í sambandi við hana.

Tey, sum ætla sær at sýna fram, kunnu seta seg í samband við tlf. 45 50 27 skjótast gjørligt, og í seinasta lagi tann 29. mai.

Av tí at plássið ikki er óavmarkað, kann tað verða neyðugt at velja millum innkomnu verkini.

Tað er ein treyt, at myndirnar eru upprunamyndir.

Tíðin er knøpp, tá farið verður at heingja upp, og tí er sera umráðandi, at mynd irnar eru fullkomiliga klárar at heingja upp, tá komið verður við teimum.

Framsýningin letur upp leygardagin klokkan 17.00, og er opin til klokkan 22.00. Sunnudagin er opið frá klokkan 15.00 til klokkan 22.00.

Atgongugjaldið er 20 krónur, og er myndaskráin samstundis ein lutaseðil. Drigið verður, tá framsýningin endar, og vinningurin er ein málningur.

## VIÐMERKINGAR

# Til det Politisk-Økonomiske Udvalg og dets medlemmer

**Tórbjørn Jacobsen**
*MF for Tjóðveldisflokkurin og medlem af den Nordatlantiske Gruppe i Folketinget*



Politiska- búskaparliga nevndin í fólkatinginum, sum fekk uppskotið hjá Tórbirni Jacobsen um føroyskan sjálvsavgerðarrætt til viðgerðar, hevur boðað frá, at hon ikki klárar at skriva álit í málinum áðrenn fólkatingi gevst tann 31. mai. Tað merkir, at onnur viðgerð og atkvøðugreiðslan fellur burtur í hesum umfari.

Men málið verður ikki slept fyri tað. Tað verður tikið upp aftur í heyst. Tórbjørn Jacobsen hevur í tí sambandi sent øllum limunum í Politisku- búskaparligu nevndini hjálagda bræv:

»Jeg tillader mig hermed at skrive til dig som medlem af det Politisk-Økonomiske Udvalg.

Mit forslag til folketingsbeslutning angående det færøske folks selvbestemmelsesret, er henvist til dette udvalg. Men da udvalget, pga. den travle kalender i denne måned, næppe vil nå behandle spørgsmålet i et møde, vil jeg gerne benytte denne lejlighed til at redegøre for nogle forhold.

I den ellers udmærkede debat om forslaget i folketingssalen var der en del misforståelser, som jeg gerne vil benytte denne lejlighed til at få rettet:

Dette forslag drejer sig ikke om færøsk "løsrivelse", som en del ordførere under debatten syntes at mene. Det drejer sig udelukkende om, at Danmark internationalt skal give det færøske folk den nationale anerkendelse, som et overvældende flertal på Færøerne mener sig at have krav på.

På Færøerne anses dette ikke bare for at have politisk, men først og fremmest kulturel betydning.

Hvis folketinget anerkender, at færinger er et eget folk (og dette må betegnes som et ubestrideligt faktum), så er folkerettens bestemmelser om folkenes selvbestemmelsesret også gældende for det færøske folk.

Det er dette, forslagsstilleren mener, at regeringen bør meddele FN. Grunden er, at den danske stat de sidste år er blevet anklaget for at nægte at anerkende, at det færøske folk er et eget folk med selvbestemmelsesret.

Dette kan det danske politiske system ikke leve med, dette kan det færøske politiske system ikke leve med, og dette kan forholdet mellem Danmark og Færøerne heller ikke leve med. Hvis ikke Danmark gør ganske klart, at man anerkender, at færinger er et folk med selvbestemmelsesret, er man på kollisionskurs med et overvældende flertal af det færøske folks opfattelse, og med fem ud af seks partier i Lagtinget. Denne sag kan dermed blive en årsag til, at de opslidende stridigheder mellem landene, som vi har oplevet de seneste år, fortsætter.

Visse personer har fremført, at grundlovens § 19 skal være til hinder for, at Danmark internationalt anerkender, at færinger er et folk med selvbestemmelsesret. Dette er ikke rigtigt. I tilfælde af, at et flertal på Færøerne på et tidspunkt måtte beslutte sig for selvstændighed, er der naturligvis visse grundlovsbestemmelser, der skal overholdes internt i Danmark. Men dette hindrer ingenlunde Folketinget i at beslutte, at afgørelsen er det færøske folks.

Dertil er det et faktum, at det færøske folk aldrig har vedtaget den danske grundlov som sin egen grundlov. Derfor er der i henhold til folkeretten ingen tvivl om, at det er det færøske folk - og ikke folketinget - der har bestemmelsesretten i denne sag. (At ca. 7 % av det færøske folk stemte i forbindelse med grundlovsændringen i 1953 kan ikke betegnes som en færøsk anerkendelse af, at det færøske folk har vedtaget den danske grundlov som sin egen grundlov).

At folketinget i sidste samling vedtog, at et færøske ønske om suverænitet skal efterkommes af folketinget, er ikke det samme som en anerkendelse af det færøske folks selvbestemmelsesret. At anerkende selvbestemmelsesretten er at anerkende, at det er det færøske folk - ikke den danske stat - der er øverste myndighed i denne sag.

Men at folketing og regering gang på gang har understreget, at man, i tilfælde af at det færøske folk ved en folkeafstemning måtte vælge selvstændigheden, ville imødekomme dette ønske, er dog meget vigtigt: Hvis Danmark alligevel vil acceptere et færøsk ønske, er der jo reelt ingen begrundelse for ikke at vedtage dette forslag.

Men som sagt: Dette forslag drejer sig ikke om færøsk suverænitet. Det drejer sig om, at Danmark skal give det færøske folk den nationale anerkendelse, som dette folk har krav på.

Visse ordførere mente også, at dette er en sag, der skal behandles på Færøerne og ikke i Danmark. Det er heller ikke korrekt. Da det er danske - og ikke færøske - myndigheder, der repræsenterer det færøske folk internationalt, må det være Danmark, der giver FN denne meddelelse.

Jeg vil til sidst erindre om, at de to grønlandske folketingsmedlemmer mener, at også det grønlandske folk har krav på national anerkendelse og anerkendelse af selvbestemmelsesretten.

Det vil derfor være et meget uheldigt signal fra folketinget til både Grønland, Færøerne og det internationale samfund, hvis Folketinget nægter at give denne anerkendelse.

Da man både på Færøerne og i Grønland mener sig at have krav på anerkendelsen, er dette naturligvis en sag, der vil blive taget op igen og igen. Jo hurtigere Folketinget tager ønsket til efterretning, jo bedre for forholdet mellem de tre lande.«

# Fyrisitingardeildin fyri Sinnisveik sett á stovn

SERFORSORG
*Tíðindaskriv*

Sum liður í Heildaspsykiatriætlanini 2002, verður nýggj deild sett á stovn undir Heimarøktini og Serforsorgini, við heitinum Fyrisitingardeildin fyri sinnisveik.

Kjarnuveitanin hjá nýggju deildini verður at bjóða virknis- og bústaðartilboð til sinnisveik, og verður høvuðsuppgávan at bjóða hesi tilboð til búfólk og viðskiftafólk innan sjúkrahúspsykiatriina, umframt til sinnisveik, ið búgva í egnum heimi.

Stovnsetanin av nýggju deildini kann metast sum ein viðurkenning av, at sinnisveik hava somu rættindi, sum øll onnur til at búleikast og virka í nærumhvørvinum. Harumframt er virksemið deildarinnar ein avgerðandi fyritreyt fyri, at tann parturin av Heildarpsykiatriætlanini 2002 sum snýr seg um menning av sjúkrahúspsykiatriini kann setast í verk.

Hilda Viderø úr Klaksvík er sett sum fakligur leiðari á deildini, og byrjar hon í starvinum

1. juni. Hilda er útbúgvin socialpedagogur og psykiatriskur røktari. Hon hevur arbeitt innan psykiatriina á Sankt Hans Hospital, hon hevur verið við til at byggja upp socialpsykiatrisk tilboð til sinnisveik í Botswana, og seinastu árini hevur hon verið leiðari á Umlættingarheiminum Dáanum í Klaksvík.

Heimarøktin og Serforsorgin ynskir nýggju deildini og leiðaranum góðan byr framyvir.

# Tíð at tekna seg til eystanstevnuframsýningina

LISTAFRAMSÝNING
*Tíðindaskriv*

Listaframsýningin á Eystanstevnu verður í Runavíkar Skúla leygardagin 15. juni og sunnudagin 16. juni.

Tað er Fimleikafelagið Støkk av Glyvrum, sum skipar fyri framsýningini og tekur sær av øllum tí praktiska í sambandi við hana.

Tey, sum hava hug til at sýna listaverk síni fram, kunnu boða frá á tlf. 448701 ella 448502 skjótast gjørligt og í seinasta lagi 7. juni.

Av tí at plássið er avmarkað, kann tað gerast neyðugt at velja millum tey innkomnu verkini.

Tað er ein treyt, at myndirnar eru upprunamyndir.

Tíðin er knøpp, tá ið farið verður at heingja upp, og tí er sera umráðandi, at myndirnar eru klárar, tá komið verður við teimum.

Listaframsýningin er opin leygardagin 15. juni kl. 17:00 til 20:00 og sunnudagin 16. juni kl. 15:00 til 20:00.

Myndaskráin er samstundis ein lutaseðil. Drigið verður, tá ið framsýningin endar. Vinningurin er ein málningur.